## Royndi hópdráp

Í USA hevur eitt nevningating gjørt av, at nigeriski maðurin Umar Farouk Abdulmutallab skal ákærast fyri drápsroynd og hópdrápsroynd, tí hann royndi at spreingja eitt amerikanskt ferðamannaflogfar uppi yvir býnum Detroit jóladag. Upprunaliga varð tann 23 ára gamli maðurin ákærdur fyri at hava roynt at spreingja flogfarið í luftina, men nevningatingið broytti ákæruna, so hon nú umfatar bæði drápsroynd og hópdrápsroynd. Málið hevur fingið nógva umrøðu í USA, og Barack Obama, forseti, hevur kravt, at eftirlitið verður hert, so at tílíkt ikki skal henda aftur.



NÓLSOYARLEIÐIN

# Ritan avlýsir næstan ongatíð

**Bæði ferðafólk og manning eru á einum máli um, at Ritan er eitt gott skip til farleiðina um Nólsoyarfjørð. Skiparin umborð á Rituni, Mortan Mortensen er samdur í hesum. – Ritan er eitt sera gott sjóskip, slær hann fast**



*Umstøðurnar í Nólsoy eru batnaðar, nú ein serstakur rampi er gjørdur til ferðafólk sum eru illa gongd ella hava barnavogn við sær*

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Nólsoy:** - Jú, vit kunnu gott bíða 1-2 minuttir aftrat!, sigur Mortan Mortensen.

Klokkan er farin at nærkast átta gjáramorgunin, og skipari og manning umborð á Rituni eru til reiðar at loysa frá landi á Bursatanga klokkan 7:55 eftir galdandi ferðaætlan.

Eitt av ferðafólkunum hevur júst heitt á skiparan um at bíða eitt lítið bil aftrat. Hesin veit nevniliga um eitt annað ferðafólk sum er ávegis, men er seinkað nakað orsakað av vánaligum koyrilíkindum og nógvari ferðslu.

Tænastan hjá manningini umfatar eisini tað at vera lagaligur, og tí er einki óført í tí at bíða hesa stuttu løtuna aftrat.

Mortan Mortensen er annars stýrimaður umborð, men nú hin skiparin, Karmal Olsen er í feriu, er tað hann sum stendur við róðrið henda morgunin. Hann hevur annars siglt við Rituni seinastu seks árini.

- Ritan er eitt gott skip, og eg haldi eisini at fólk eru sera glað fyri hana, slær hann fast.

### Samd

Tey sum best kenna til farleiðina millum høvuðsstaðin og Nólsoynna eru nólsoyingarnir sjálvir.

Í samrøðu við Sosialin í gjár greiddi eitt av ferðafólkunum frá fyrimunum og vansum við at hava eitt slíkt strandfaraskip sum Rituna sum teirra ferðasamband við umheimin.

Vígdis Bjarnadóttir úr Nólsoy legði í samrøðuni dent á, at Ritan er bæði óhøglig og ótíðarhóskandi við nógvum larmi og vánaligari inniluft. Í salongini var so nógvur larmur, at tað var ikki meiri enn at ein hoyrdi mannamál.

Samstundis vísti hon á, at tað neyvan fanst eitt meiri álítandi strandfaraskip enn Ritan. Hon kundi sigla í so at siga øllum veðri, og tað var ikki meiri enn tað kom fyri, at hon avlýsti ein túr.

- Men vit bíða framvegis eftir teirri endaligu loysnini uppá eitt nýtt skip, sum er skræddarseymað til okkara tørv, legði hon dent á.

Í øllum hesum er manningin neyvan ósamd!

### Í øllum veðri

Ritan varð bygd í 1971, og hevur røkt sigling á ymiskum farleiðum kring landið, bæði til Sandoynna og tey seinnu árini burturav til Nólsoyar.

Mortan Mortensen ger púra greitt, at hóast Ritan hevur 39 ár á baki, so er hon eitt sera gott skip. Og, sum hann leggur dent á:

- Ritan klárar seg í øllum veðri!

Besta tekinið um at so er, er tað at ferðafólkini til eina og hvørja tíð hava kent seg, og framvegis kenna seg trygg umborð á ferjuni.

Hóast tað mangan kann vera baldrut um Nólsoyarfjørð, kemur tað nærum ikki fyri at fráferðir verða avlýstar. Og hetta ger sjálvandi sítt til, at fólk altíð hava vitað at tey kunnu sleppa til og frá arbeiði.

### Betri umstøður

Høvdu nólsoyingar ikki Rituna, hevði neyvan borið so væl til hjá teimum at kunna búð í oynni og havt arbeiðsstað sítt í Havn ella aðrastaðni.

Ferðaætlanin hjá Rituni er skipað so, at siglt verður millum fimm og átta ferðir um Nólsoyarfjørð um dagin, soleiðis at fólk kann sleppa til og frá arbeiði sum teimum lystir.

- Jú, eg haldi at nólsoyingum dáma Rituna sera væl. Men eingin ivi er um, at atkomumøguleikarnir kundu verið betri, leggur skiparin dent á.

Hann vil tó – sum vera man – ikki úttala seg um politisk viðurskifti í hesum sambandi, men fá munnu vera ósamd við honum í, at umstøðurnar at sleppa umborð og í land kundu verið betri.

> *Eg haldi at nólsoyingum dáma Rituna sera væl. Men eingin ivi er um, at atkomumøguleikarnir kundu verið betri*

### Bilar og farmur

Ikki tí, hesar umstøðurnar eru batnaðar almikið í Nólsoy við teirri rampuni sum nú er komin at standa á bryggjuni.

Men framvegis mugu fólk, sum annaðhvørt eru til gongu ella fara í land við barnavogni á Bursatanga í Havn eftir eini smalari og óhøgligari landgongd.

Ein annar vansi við hesum umstøðum er, at til ber ikki at fáa eitt nú bilar fluttar við Rituni, eins og fólk við breki ella sjúku ikki sleppa so væl umborð.

Tá Ritan siglur um Nólsoyarfjørð er talan fyri tað mesta um ferðafólk. Men av og á er eisini tørvur á flutningi av farmi.

Teir vanligu túrararnar eru ikki stundir til stórvegis lasting av farmi, men fyri at bøta um hesar umstøðurnar eru skipaðir nakrir fastir farmatúrar um vikuna – mánadag, mikudag og fríggjadag.



*Umborð á Rituni er bert tann eina salongin til ferðafólkini. Her hoyrist nærum ikki mannamál fyri larminum frá maskinuni*